# Kyndil misti eitt stórt fet

**HONDBÓLTUR** Henrik Gerster og Kyndil eru fyribils ikki partar av oddastríðnum í bestu mansdeildini. Liðið misti aftur tvey stig í gjár

Uni Holm Johannesen

Tað hava verið ov stór sveiggj í avrikunum hjá Kyndil í hesum kappingarárinum.

Úrtøkan higartil er sjey stig. Høvuðsstaðarliðið hevur vunnið á VÍF, StÍF og Team Klaksvík, spælt javnt móti Neistanum, og tapt tvær reisur fyri KÍF, og einaferð fyri H71.

Kyndil tapti 30-25 í Kollafirði í gjár.



Mynd: Álvur Haraldsen

### Agnar skeyt brotskøstini

Agnar Joensen spældi fyri fyrstu ferð við KÍF í gjár.

Hann var ikki nógv inni á vøllinum, men hann tók sær av brotskøstunum, sum hann sendi trygt í netið.

Kollafirðingar vóru framman fyri 11-10, tá átta minuttir restaðu í av fyrra hálvleiki. So setti heimaliðið ferðina upp.

KÍF fór til hálvleiks við støðuni 17-12.

Tað var serliga í verjupartinum, at Kyndil var lítið sannførandi. Heimaliðið spældi seg lætt til upplagdar møguleikar, og serliga tók Gert Hansen ofta av. Hann skeyt seks mál.

Avgerandi løtan var miðskeiðis í seinna hálvleiki. KÍF var á odda 21-16, tá gestirnir gjørdu bart og komu upp á 22-21. Tá vóru tólv minuttir farin av seinna hálvleiki.

Kyndil fekk sítt næsta mál, tá fimm minuttir vóru eftir av dystinum, men tá høvdu kollfirðingar skotið 28 mál í alt, og tá var ov seint.

# Team Klaksvík setir sær smá mál



Mynd: Álvur Haraldsen

**HONDBÓLTUR** – Vit hava tapt greitt í øllum landskappingardystunum higartil, men vit eru sum so nøgdir við menningina, sigur Fríði Ziskason í viðtalu við heimasíðuna hjá Neistanum

Uni Holm Johannesen

Tapti Klaksvík tapti aftur greitt og uppiborið hesaferð.

Greipuvinnararnir úr Neistanum runnu klaksvíkingarnar um koll og vunnu 41-24.

Fríðin Ziskason er formaður og partur av leikarahópinum hjá Team Klaksvík, sum royna seg í fremstu deildini fyri fyrstu ferð.

Felagið setti sær sum mál at menna ungu og óroyndu spælararnar, sum ætlandi skulu bjóða hinum av um tvey ella trý ár.

Við støði í menningini, er Fríði Ziskason nøgdur.

– Støðan er í lagi. Vit seta okkum smá mál. Vit hava tapt stórt í øllum dystunum, og longu aftaná 15 minuttir plaga dystirnir at verða avgjørdir. Tað vildu vit ikki í dag, og vit vóru aftan fyri við trimum málum, so tað var í lagi, sigur Fríðin Ziskason við neistin.fo.

### Royndu at renna við

Tað var serliga seinastu løtuna, at Neistin rann undan gestunum.

Heimaliðið skeyt 11 mál seinastu 15 minuttirnar í fyrra hálvleiki, og Team Klaksvík fekk bara fýra.

Útgangsstøðið hjá klaksvíkingum var øðrvísi hesaferð, sigur Fríðin Ziskason. Hann ger greitt, at Team Klaksvík royndi at renna við Neistanum, heldur enn at draga ferðina úr dystinum.

– Teir fáa færri mál eftir skjótálop, so tað riggaði í ein ávísan mun. Vit ætlaðu at halda teimum frá at fáa 40 mál hesaferð, men tað eydnaðist akkurát ikki, sigur Fríðin Ziskason við heimasíðuna hjá Neistanum.

Tá Team Klaksvík og Neistin spældu í Klaksvík í fyrsta umfarinum vunnu greipuvinnararnir 49-32.

Finnur Hansson, Neistin, var toppskjútti í gjár við 10 málum.

# Sandavágsmenn vunnu á føroyameistarunum

**TALV** Eftir trý umfør í fremstu deildini í talvi, er Sandavágs Talvfelag á odda. Í vikuskiftinum vunnu teir tryggan 3-1 sigur á verandi føroyameistaranum úr Klaksvík

Uni Holm Johannesen

Undan 3. umfari vóru havnarmenn javnir við sandavágsmenn, men teir spældu bara 2-2 móti Klaksvík 2. Bæði Klaksvík og Sandavágur hava tvey lið í 1. deild.

Komandi sunnudag verður sannur toppdystur í Sandavági, tá ið havnarmenn koma á vitjan.

*Úrslit í 3. umf:*
Sandavágur - Klaksvík: 3-1
Havnin - Klaksvík 2: 2-2
Vestm. - Sandavágur 2: 3,5 - 0,5

**Støðan:**
Sandavágur 10
Havnin 9
Klaksvík 6
Vestmanna 6
Klaksvík2 4,5
Sandavágur2 0,5

# VÍF aftur á beint

**HONDBÓLTUR** VÍF hevði ikki vunnið í seinastu trimum royndunum, tá vestmenningar komu aftur á beint í gjár

Uni Holm Johannesen

VÍF vann greitt og uppiborið á StÍF. Úrslitið var 28-15.

Vestmenningar fóru frá gestunum í fyrra hálvleiki, og munurin bara øktist við tíðini.

Magnus Muller, VÍF, var toppskjútti. Hann skeyt átta av málunum.

Leivur Justinussen skeyt flest mál fyri StÍF. Hann fekk sjey mál.

Við sigrinum lyftu vestmenningarnir seg upp um StÍF á stigatalvuni. VÍF er nummar fimm við fimm stig, og StÍF nummar seks við fýra stigum.

uni@sosialurin.fo